# Nýtt neyst til virt felag

**Róðrarfelagið Knørrur er farið undir sølu av lutaseðlum við helst størsta vinningi nakrantíð. Peningurin fer til útvegan av nýggjum neysti til hetta virkna felagið**

KAPPRÓÐUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Knørrafelagið, sum tað vanliga verður nevnt, hevur nú 20 ár á baki og er so líðandi vorðið eitt skipað og virt felag í føroyskum kappróðri.

Felagið hevur vunnið hópin av FM-heitum, serliga við kvinnumanningini á Jarnbardi, sum hevur skarað framúr.

Felagið eigur eisini áttamannafarið Knørr, og næsta ár kemur eitt fimmmannafar upp í flotan.

## Annað skil á

Jannie Dam Jacobsen, forkvinna í felagnum sigur, at øll hesi árini hevur felagið húsast í einum gomlum og ótíðarhóskandi neysti við Lágukei.

- Men nú skal fáast annað skil á, sigur hon í stuttari viðmerking.

Fyrsta tiltakið í hesum sambandi er ein stór lutaseðlasøla við vinningum, sum ikki hava verið at sæð áður.

Millum hesar ovurstóru vinningar er ein ein, har til ber at fáa ein gartnara at hampa um garðin, ella ein húsasmið at snøgga um húsini.

- Hetta er eitt stórt stig at taka, og tí verða allar kreftir settar inn, so at felagið kann fáa ein góða upphædd til bygging av einum nýggjum og tíðarhóskandi neysti til rógvarar og limir sínar, sigur Jannie Dam Jacobsen.




*Kvinnurnar á Jarnbardi hava verið óførar við árunum. Nú ræður um at útvega felagnum eitt nýtt neyst við sølu av lutaseðlum við stórum vinningum*




## Starvsfólk ella lærlingur til avgreiðsluna/støðina

Søkt verður eftir skrivstovufólki ella lærlingi til avgreiðsluna/støðina hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

Arbeiði fevnir m.a. um:
- avgreiðslu av ferðafólki
- avgreiðslu av flogførum
- telefonavgreiðslu
- avgreiðslu av ferðaseðlum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin (skrivstovufólkið) hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi. Lærlingur skal hava HH ella líknandi prógv.

- dugir at arbeiða við teldu
- hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug til at arbeiða skiftandi tíðir
- kann arbeiða undir trýsti

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Egin Simonsen á tlf. 34 10 22, 34 10 50 ella e-mail: egin@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com